fylgiskjal 3

LM-068/2022

Kristvør H. Poulsen

Fra: Betzy Ludvig
Sendt: fríggjadagur, 3. september 2021 12:49
Til: Kristvør H. Poulsen
Cc: Andras Kristiansen; Jens Helgi Toftum
Emne: 21/15255-1 - Til hoyringar: Uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd - freist 6. septembur 2021

Til UVMR,

Viðvíkjandi lógaruppskotinum um náttúruvernd skal Fiskimálaráðið gera vart við, at § 6, stk. 1, sum ásetir, at veiða og onnur tøka av dýrum, sum natúrliga liva vill, kann bara fara fram sambært lóg ella avgerð við heimild í lóg, broytir núverandi rættarstøðu viðvíkjandi kópaveiðu.

Burtursæð frá einstøkum avmarkingum í í aðrari lóggávu viðvíkjandi veiðuhátti og veiðu í sambandi við alibrúk, er veiða av kópi sum heild ikki skipað við lóg. Hetta merkir, at hon er loyvd.

Hendan rættarstøða verður broytt við omanfyri nevndu § 6, stk. 1 í lógaruppskotinum, soleiðis at kópaveiða ikki verður loyvd.

Støða má takast til, hvør rættarstøðan viðvíkjandi kópaveiðu skal vera.

Annars hevur Fiskimálaráðið ongar viðmerkingar til uppskotið.

Vinarliga

Betzy Ludvig

Logfrøðingur

Fiskimálaráðið / Ministry of Fisheries
Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 26 77 03 • Fax (+298) 35 30 35 • betzy.ludvig@fisk.fo • www.fisk.fo

Fra: Kristvør H. Poulsen <Kristvorp@uvmr.fo>
Sendt: fríggjadagur, 23. juli 2021 15:24
Til: Føroya Fuglafrøðifelag <ffff@kallnet.fo>; Bóndafelag Føroya <sigert@bondi.fo>; Búnaðargrunnurin <bg@bg.fo>; BST Postur <bst@bst.fo>; Ari Johanneson <AriJ@us.fo>; Ferðavinnufelagið <birita@industry.fo>; FNU <fnu@fnu.fo>; Fróðskaparsetur Føroya <setur@setur.fo>; Froskmannafelagið <christiansen.david@gmail.com>; Føroya